# Krabbameinsútgreining
# Illgruni um krabbamein í tjúkk- og endatarmi

## Sjúkueyðkenni, ið geva illgruna um tjúkk- og endatarmskrabba

- Bløðing frá endatarmi uttan aðra upplagda orsøk
- Broytt opningsmynstur í > 4 vikur
- Nýliga íkomin búkpína, sum hevur vart > 4 vikur
- Bløðings- ella jarnmangulanæmi uttan aðra upplagda orsøk

Eitt ella fleiri av omanfyri nevndu sjúkuteknum ella kliniskum funnum eigur, serliga hjá sjúklingum > 40 ár, at viðføra:

- Palpatión av abdomen
- Rektal eksploratión
- Blóðroyndir við atliti til anæmi
- Undirlívskanning hjá kvinnum

Listin omanfyri er vegleiðandi og ikki fullfíggjaður. Nakrir sjúklingar við tarmkrabba hava eisini almenn sjúkutekin sum vekttap, møði v.m.

Í summum førum kemur tarmkrabbi akutt til sjóndar við ileus, perforatión, bløðing og líknandi. Tá skal sjúklingurin innleggjast akutt.

Metastasur frá tarmkrabba geva sjáldan sjúkueyðkenni og verða ofta eyðmerktar, tá útgreinað verður fyri krabba uttan fokus ella ísv. uppfylging fyri krabba.

## Ávísing til krabbameinsútgreining

Um eingin onnur greið orsøk er til nevndu sjúkutekin omanfyri, skal sjúklingurin ávísast við illgruna um tarmkrabba.
Sjúklingar < 40 ár við kendari arvaligari dispositión til tarmkrabba, eiga at hava serligt uppmerksemi

## Handfaring av recidiv ella progressión

Í uppfylgingartíðarskeiðnum: Um sjúkueyðkenni til recidiv ella progressión vísa seg, skal vísast til deildina við ábyrgd av sjúkugongdini hjá sjúklinginum.
Eftir uppfylgingartíðarskeiðið: Um illgruni er um recidiv skal ávísast av nýggjum við illgruna um krabbamein í tjúkk- ella endatarmi.

## Ávísingin

Útfyll vinarliga ávísingarfrymilin "Illgruni um krabba í tjúkk- og endatarmi" undir móttakandi eindini "Krabbaútgreining" í Cosmic. Lýs støðuna undir aktuelt - íroknað nær sjúkutekini eru íkomin v.m.
Orða vinarliga ávísingina so neyvt, at tað er lætt hjá serøkinum at visitera og bíleggja viðkomandi kanningar, so útgreiningartilgongdin verður so skynsom sum gjørligt.

Útgáva januar 2026